kom inn í øllum góðum, og tá vóru vónirnar eisini betri, at Sjóriddarin eisini fór at koma, men tað gjørdi hann ikki.

Eftir hesa vanlukkuna játtaðu ríkismyndugleikarnir at seta vita á Pokerisnes. Tað var sum ikki einaferð. Menn høvdu leingi heitt á myndugleikarnar um at fáa sett hendan vitan, men ein slík vanlukka skuldi til, áðrenn nakað hendi.

## Feigdarárið 1920: Helena, Kristina og Karen

Árið 1920 var av sonnum eitt feigdarár í Føroyum. Hetta rakti serliga Suðuroynna. Skipini fóru sum vanligt avstað um várið og vóru væntaði aftur tveir-tríggjar mánaðir seinni. Tað var ikki fyrr enn tey ikki komu aftur sum væntað, at fólk fóru at gruna, at tað var okkurt galið. Menn kundu havt verið deyðir í mánaðir, meðan fólkið heima helt væl til standa.

Tí var tað ikki fyrr enn 14. juni, at Føroyatíðindi, kundi koma við eini grein við yvirskriftini:

## To færøske Kuttere forliste

Farvandene ved Islands Sydkyst har med rette Ord for at være meget farlige for Sejlads og Fiskeridrift. Fransk og engelsk Fiskeri var drevet ved Kysterne af Sydisland i mange Aar, før Færinger dristede sig derop paa den Aarstid, hvor der er størst Udsigt til rigelig Fangst, men Indsatsen af Menneskeliv og Fartøjer er til gengæld ogsaa meget betydelig.

Men mens særlig Fransk-mændene med deres store og i Paalandsstorm lidet manøvre-dygtige Fartøjer har været udsatte for store Tab ved Forlis, er Færinger hidtil sluppet forholds godt fra det indtil nu, idet kun én Kutter, nemlig Olivia (hjá Pola í Dali) af Thorshavn er bleven borte (í 1912). (Bella og Løwenørn fórust eisini undir Íslandi í 1882.) To Kuttere, nemlig Suðringur og Teistin av Tveraa er strandede, men Mandskabet reddet, og en Baadbesætning er omkommen under Forsøg paa at bringe Hjælp.

Indtil nu. Desværre kan det ikke dølges, at alt Haab er ude, og at man aldrig vil spørge Tidende fra to af vore Kuttere, der er forlist med Mand og Mus.

Kristine af Klaksvig ført af Axel Sivertsen og med en Besætning paa 15 Mand afsejlede til Fiskeri paa Sydlandet den 21. Februar og er siden da sporløst forsvunden. Samme skæbne er overgaaet Helene af Tveraa, ført af Michel Michelsen og med en Besætning paa 19 Mand. Den sejlede ud fra Trangisvaag den 26. februar omtrent samtidigt med Kutterne Falkur og Skarpheðin.

Alle blev de udsat for frygtelige Storme, men medens de to sidstnævnte slap uskadte fra Turen, gik de to andre Undergangen i Møde. Hvorledes det er gaaet til, vil for alle Tider forblive en Gaade. Det kan være sket paa Overrejsen. Føreren af Falkur beretter, at han iagttog saadanne Braadsøer, at de vilde have sendt selv større Skibe end en Kutter til Bunds hvis de ramte.

Ulykken kan naturligvis ogsaa have fundet sted paa Sydlandet, ved Oversejling eller ved Sammenstød. En fransk Trawler beretter saaledes at have set to Skibe komme i Kollision og forsvinde fra Overfladen uden at efterlade sig Spor. Der er som sagt mange Muligheder.

Tabet af de to Kuttere med dygtige Førere og udsøgt Mandskab har vakt stor Sorg ikke blot blandt de omkomnes Efterladte men i hele befolkningen, der i Angst og Spænding forgæves har ventet at spørge nyt fra de savnede.

## 9 einkjur við 22 børnum

Alene her paa Suderø sidder 9 Enker med 22 Børn tilbage uden Forsørgere. Noget lignende er utvivlsomt Tilfælde for det andet forliste Mandskabs Vedkommende.

Til Sorgen over Tabet af deres Værn og Støtte kommer desuden bekymringen for det daglige Udkomme i Fremtiden. Og forsaavidt som de af Forsørgerne indgaaede Forsikringer, samt den af Stat og Kommune ydede Hjælp til Enkebørn viser sig at være Utilstrækkelig, vil utvivlsomt det Samfund, der i sin Helhed har lidt uerstattelige Tab, med Rundhaandhed vide at træde hjælpende til.

Kutter Helene der tilhørte Aktieselskabet J. Mortensens Eftf. Tveraa, ansaas for at være et af Færøernes stærkeste og bedste Sejlskibe. Sejl og Redskaber var af første Klasse, saaledes som det bør være paa en Sydlandskutter. Som Bevis paa, at det var et fortrinligt Søskib tjener, at det aldrig fik en Baad slaaet i Stykker og som en sjældenhed revne Sejl. Det var ligeledes paafaldende, hvor godt det klarede sig i Storm og Søgang og sjælden fik Skade, mens de andre kom ind med forrevne Sejl og Sønderslaaede Baade. Denne



*Poul og Anna Maria Jespersen. Poul fórst við General Gordon*



*Sonur teirra Jógvan fórst saman við pápanum*



Elsba f. Hammer og Daniel Jacob Ludvig mistu tríggjar synir við Helenu og General Gordon



*Sonur teirra Poul Johannes Ludvig gekk burtur við General Gordon*



*Sonur teirra Jóan Jákup Ludvig gekk burtur við Helenu*

Omstændighed tjener ogsaa Føreren til Ære.

Kaptajn Mikkelsen var som Fører ualmindelig ernergisk, dristig og udholdende, hvorfor han ogsaa fulgtes af et glimrende Held og var en af de første paa Fiskeriets Omraade. Vi giver en Fortegnelse over Udbyttet de Aar, han førte Helene.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1914 | 480 skpd | 24.000 kr. | |
| 1915 | 535 skpd | 35.200 kr. | |
| 1916 | 710 skpd | 49.300 kr. | |
| 1917 | 325 skpd | 24.700 kr. | bert Suðurlandið |
| 1918 | 835 skpd | 99.600 kr. | |
| 1919 | 1350 skpd | 166.000 kr. | |
| Tils. | 4.235 | 398.800 kr. | |

En gennemsnitsfangst paa ca. 66.500 kr. om Aaret er ret Enestaaende. Alt for tidlig, synes man, afsluttedes mange flinke Mænds Virksomhed til Bedste for deres Familie og det Samfund, de tilhørte.

## Um Helenu

Pàll Nolsøe greiðir frá í Siglingarsøguni, at tað var Christian hjá Ludda í Dali í Havn, sum keypti Helenu til Føroyar í 1899. Hon var tá dammslupp. Hon var bygd í 1882 og merkt 93 tons. Fyrsti skipari var Sandoyar Andreas, sum eisini førdi hana til Føroyar. Mortensen Handil keypti hana í 1902. Tey fyrstu árini førdi Johan Hendrik Isaksen av Viðareiði hana. Andreas Andreassen av Høvdanum á Strondum førdi hana síðan árini 1906-8. Jóan Jakku á Viðareiði førdi so Helenu til 1914.

Í 1911 misti Helene ein mann. Tað var Dánjal Jóhannes Kornelius Andreassen í Múla.

Um dagin tann 1. juni høvdu fýra menn av Helenu verið umborð á Grimsbytrolaranum Corellu og flakt, og aftur fyri skuldu teir fáa fisk. Um náttina skuldu nakrir fara umborð eftir fiskinum, og Dánjal Johannes var fyrstur í bátin. Men í tí hann leyp niður av dekkinum lyftist báturin av eini aldu, og maðurin fór øvugtur fyri borð. Hann varð bjargaður og arbeitt var uppá hann, men til fánýtis.

Aftaná Jóan Jakku tók Mikkjal Michelsen í Búð í Hvalba við. Hann var føddur 23. apríl 1885 og tók skiparaprógv hjá Jens í Dali í 1908. Hann var tey fyrstu árini til skips við William Clowes við Mikkjal í Geil. Hann var síðan tvey ár bestimaður hjá Christoffer í Vátutoft við Riddaranum. Hann hevði ikki lært tá. Í 1908 var hann bestimaður hjá Palla í Mýruni við Falkinum.

Fyrsta skipið, Mikkjal í Búð førdi, var Sildberin í 1909 og 1910. Síðan førdi hann Kjógvan í 1911-1913. Í 1914 fór hann at føra Helenu.

Mikkjal var giftur, og konan var úr Hovi. Tey fluttu til Hvalbiar aftaná vanlukkuna. Húsini á Tvørábakka, har tey búðu, blivu so seld.

## Við Helenu fórust:

**Úr Hvalba**

- Mikkjal í Búð, skipari, 35 ár, Einkja og fimm børn
- Mortan Holm í Geilini, bestimaður, 27 ár. Einkjan við teimum báðum synunum Poul og Jens, flutti til Porkeris.
- Tummas Strøm, 27 ár. Eftir sat einkja og trý børn
- Óli Vilhlem Holm, 25 ár,
- Óli Skaalum, 25 ár
- Jóan Jákup Ludvig, 21 ár. Hann ætlaði at fara á læraraskúla, og skuldi ikki við hendan túrin. Men hann fór kortini vegna avboð frá onkrum. Tveir beiggjar hansara Poul Johannes og Meinhard gingu burtur við General Gordon

**Úr Sandvík**

- Niels Jákup Poulsen, 38 ár. Eftir sat einkja og trý børn
- Jenis Hansen, 25 ár